# Uttanríkis- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 20. juli 2022 |
| Mál nr.: | 21/08685 |
| Málsviðgjørt: | SJ/OYS |
| Ummælistíð: | 20. juli – 27. juli 2022 |
| Eftirkannað: | 1. august 2022 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um studningslán til at byggja húsarhaldskúla í Klaksvík**
(Hækka studningslánið og áseta stuðul til innbúgv og útbúnað)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 68 frá 9. mai 2019 um studningslán til at byggja húsarhaldsskúla í Klaksvík, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

"**Løgtingslóg um studningslán og stuðul til at byggja húsarhaldskúla í Klaksvík**"

**2.** Í § 1, stk. 1, 2. pkt. verður "21 mió. kr." broytt til: "37,3 mió. kr."

**3.** Aftan á § 1 verður sett:

"**§ 1 a.** Heimilað verður landsstýrismanninum at veita stuðul til keyp av innbúgvi og útbúnaði, í mesta lagi 5 mió. kr. Treytin fyri at stuðulin verður latin er, at sjálvsognarstovnurin Húsarhaldsskúli Føroya fíggjar 50% av útreiðslunum til keyp av innbúgvi og útbúnaði.
*Stk. 2.* Umframt treytina í stk. 1 kann landsstýrismaðurin áseta aðrar treytir fyri at veita stuðulin, so sum útgjald av stuðli, krøv til at keypa innbúgvið, mannagongdir í samband við innheinting av tilboði oa.
*Stk. 3.* Ásetingarnar í §§ 2 og 3 eru ikki galdandi fyri stuðul til keyp av innbúgvi og útbúnaði, sbrt. stk. 1."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Verkætlanin at byggja nýggjan húsarhaldsskúla í Klaksvík er ein verkætlan, sum sjálvsognarstovnurin Húsarhaldsskúli Føroya stendur fyri, men sum landskassin, Klaksvíkar kommuna og Bústaðir fíggja.

Sambært løgtingslóg nr. 68 frá 9. mai 2019 um studningslán til at byggja húsarhaldsskúla í Klaksvík, skal verkætlanin í mesta lagi kosta 67 mió. kr. v/mvg, har landskassin og Klaksvíkar kommuna fíggja 21 mió. kr. hvør, svarandi til kostnaðin av skúlapartinum, og Bústaðir 25 mió. kr. svarandi til kostnaðin av bústaðareindini. Eftir ætlan skal sjálvsognarstovnurin eiga skúlan á fyrstu hædd við sjálvstøðugum matrikkulnummari, meðan Bústaðir fer at eiga bústaðareindina. Bústaðareindin verður síðani leigað, út til sjálvsognarstovnin (*"blokkleiga"*) til húsaleigu, ið Bústaðir áseta í mun til kostnað.

Aftan á at Húsarhaldsskúlin hevur havt byggingina av nýggja skúlanum í útboði, og skúlin saman við ráðgevanum hevur gjøgnumgingið tilboðini, umframt at tillagingar eru gjørdar í verkætlanini, hevur tað víst seg, at samlaði kostnaðurin er væl hægri enn upprunaliga mett. Sambært skúlanum verður kostnaðurin tilsamans 85,6 mió. kr. v/mvg., íroknað ráðgeving, prosjektering, byggileiðsla, eftirlitsarbeiði og aðrir avleiddir kostnaðir.

Viðvíkjandi kostnaðinum er tað Húsarhaldsskúlin, sum stendur inni fyri, at hann er rættur, og at hann fer at halda. Leisturin í galdandi heimildarlóg er tann, at landsstýrismaðurin í mentamálum hevur heimild til at stuðla byggiverkætlanini hjá sjálvsognarstovninum Húsarhaldsskúla Føroya, og verður hesin stuðul veittur sum studningslán, sbrt. § 1, stk. 2 í heimildarlógini, samsvarandi nærri treytum í stuðulstilsøgn. Av tí at landsins byggiteknisku førleikar eru miðsavnaðir hjá Landsverki, hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið leitað sær ráðgeving frá stovninum í samband við, at nærri treytir skuldu setast í tilsøgnini um stuðul til ráðgeving og projektering á 1,38 mió. kr., ið varð latin Húsarhaldsskúla Føroya í 2019. Partur av stuðlinum hevur sostatt verið nýttur av skúlanum til at keypa privata ráðgeving, og hevur leikluturin hjá Landsverki av somu orsøk higartil verið avmarkaður. Var talan um eina verkætlan,har landið var byggiharri, vildi Landsverk sum meginregla havt til uppgávu at granska verkætlanartilfarið, bjóða út og meta um tilboðini, men av tí at talan er um ein sjálvsognarstovn, liggur tann uppgávan hjá skúlanum og teirra ráðgeva.

Skúlin hevur nú fingið eitt ítøkiligt tilboð uppá arbeiðstøkuna, og metir Uttanríkis- og mentamálaráðið, at fígging av meirkostnaðinum er ein neyðug fyritreyt fyri, at ítøkiliga verkætlanin kann fremjast í verki.

Húsarhaldsskúli Føroya hevur vent sær til Uttanríkis- og mentamálaráðið við eini umbøn um at hækka stuðulin til byggingina. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur umrøtt spurningin um fígging og býti av meirkostnaðinum við Bústaðir, Klaksvíkar kommunu og Húsarhaldsskúla Føroya. Bústaðir hava játtað at fíggja partin av meirkostnaðinum fyri búeindina, og fáa Bústaðir við tíðini hendan meirkostnað inn aftur umvegis rakstrargjaldið frá búeindini, ið verður ásett við útgangsstøði í gjaldi frá búfólkunum. Hinvegin hevur Klaksvíkar kommuna, eftir at hava ummælt hendan spurning í fíggjarnevndini, ikki ætlanir um at hækka galdandi býráðstilsøgn á 21 mió. kr. í stuðli til skúlapartin.Við hesi upphæddini hevur kommunan rindað meiri enn tey 25%, sum hon í minsta lagi skal sambært § 2, stk. 1 í løgtingslóg nr. 68 frá 9. mai 2019 um

studningslán til at byggja húsarhaldsskúla í Klaksvík. Fyri landskassan merkir hetta sostatt eina meirútreiðslu á 16 mió. kr.

Sambært TAKS lýkur Húsarhaldsskúlin ikki treytirnar um afturbering av meirvirðisgjaldi sambært mvg-lóggávuni, og skal tí rinda meirvirðisgjald av verkætlanini. Av meirútreiðsluni á 16 mió. kr. eru 11,6 mió. kr. meirvirðisgjald av samlaðu útreiðslunum av skúlabyggingini, ið skúlin við hesum broytingaruppskotinum fær játtað úr landskassanum, sum studningslán. Viðmælti leisturin, har heimildin hjá landsstýrismanninum at játta stuðul til verkætlanina verður hækkað, er fingin til vegar í samráð við Fíggjarmálaráðið, og hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið ummælt hvørt rættast hevði verið, at verkætlanin í heimildarlógini bleiv frítikin fyri meirvirðisgjald. Fyrimunir og vansar eru við báðum leistum. Mett verður tó, at viðmælti leisturin samsvarar við, at Fíggjarnevndin á fíggjarlógini fyri 2022 hevur játtað 4 mió., kr. afturat í stuðli til byggingina sum kompensatión fyri, at verkætlanin ikki er frítikin fyri meirvirðisgjald.

Bústaðir taka sær av meirvirðisgjaldinum fyri bústaðareindina.

Útreiðslubýtið av byggingini av skúlanum millum landskassan og Klaksvíkar kommunu verður sum niðanfyri, tá ið meirvirðisgjald ikki er íroknað:

- Landskassin 25,4 mió. kr. svarandi til 54,74%
- Klaksvíkar kommuna 21,00 mió. kr. svarandi til 45,26%

Sambært § 2, stk. 1 í heimildarlógini er lánið treytað av, at landið fær síðusettan 1. veðrætt í bygninginum. Í hesum sambandi skal landið sambært § 1 í løgtingslóg nr. 76 frá 17. mai 1994 um tinglýsingargjøld v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, rinda 1000 kr. í tinglýsingargjaldi til Umhvørvisstovuna, umframt 1% av lánsupphæddini, á leið 300 tús. kr. í tinglýsingaravgjaldi, sbrt. § 3 a, stk. 1 í løgtingslóg nr. 8 frá 28. februar 2006 um tinglýsingaravgjald, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 156 frá 23. desember 2015. Mett verður at rættast er, at upphæddin til tinglýsingargjald og tinglýsingaravgjald verður tikin av stuðulsjáttanini við, at upphæddirnar verða settar á somu høvuðskontu, eyðmerkt til tinglýsingargjald og tinglýsingaravgjald.

Sambært § 11, stk. 1, nr. 1 í løgtingslóg nr. 66 frá 13. mai 1992 um húsarhaldsskúlar kann landskassin í mesta lagi veita stuðul til bygging ella umbygging á 50%. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur saman við Húsarhaldsskúla Føroya umrøtt spurningin um at fáa til vegar aðra fígging, eitt nú við lántøku. Vansin við hesum leisti er - tá ið havt verður í huga støddina á tí fígging, ið tørvur er á - at møgulig lántøka má haldast at fara at tyngja raksturin av skúlanum munandi. Í hesum sambandi skal eisini vísast á, at sbrt. § 11, stk. 1, nr. 5 í løgtingslóg nr. 66 frá 13. mai 1992 um húsarhaldsskúlar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 129 frá 11. september 2017, rindar landið 70% av øllum øðrum góðkendum rakstrarútreiðslum hjá Húsarhaldsskúla Føroya, ið ikki eru nevndar í § 11, stk. 1, nr. 1-4, undir hesum rentur. Verður meirkostnaðurin latin sum rentu- og avdráttarfrítt studningslán, verður veðið hjá landinum í bygninginum tilsvarandi størri, og fellur samlaða studningslánið til gjaldingar, um so er, at bygningurin verður seldur ella ikki longur verður nýttur til húsarhaldsskúla, sbrt. §§ 2 og 3 í galdandi heimildarlóg.

Uttanríkis- og mentamálaráðið vil tískil mæla til, at frávik verður gjørt frá § 11, stk. 1, nr. 1 í løgtingslógini um húsarhaldsskúlar við umbidnu broytingini í § 1, stk. 1 í heimildarlógini, soleiðis at landið átekur sær at fáa til vega, neyðugu fíggingina til skúlapartin.

Í skipanaruppskotinum frá 2018[1] er nevnt, at innbúgv og útbúnaður ikki er roknað við í byggikostnaðinum fyri verkætlanina og víst verður í staðin til § 11, stk. 1, nr. 2 í løgtingslógini um húsarhaldsskúlar, ið ásetir, at landið letur 50% av kostnaðinum í stuðli til at keypa innbúgv og útbúnað fyri sambært reglugerð. Eftir at hava viðgjørt henda spurning av nýggjum við skúlan, og fyri at vísa metta veruliga kostnaðin av at byggja ein nýggjan húsarhaldsskúla, verður mett rættast, at innbúgvið verður tikið við, soleiðis at landskassin fíggjar upp til 5 mió. kr. av tí, sum innbúgvið er mett at kosta, meðan skúlin sjálvur átekur sær at finna írestandi fígging til innbúgv, á leið 5 mió. kr. í alt tilsamans 10 mió. kr. Stuðulin frá landinum kann tískil ikki fara upp um 50% av veruligu útreiðslunum til at keypa innbúgv og útbúnað fyri, og er hesin stuðulsleistur sum heild í samsvari við galdandi stuðulsleist fyri at keypa innbúgv sambært § 11, stk. 1, nr. 2 í løgtingslóg nr. 66 frá 13. mai 1992 um húsarhaldsskúlar.

Skúlin hevur ikki fingið sín part av fíggingini av innbúnum upp á pláss, tí skúlin bíðar til hann hevur fingið loyvi at fara í gongd við verkætlanina. Stuðulin til innbúgv verður latin sum beinleiðis stuðul, t.v.s. at hann verður ikki latin sum rentu- og avdráttarfrítt lán eins og stuðulin til byggingina.

Samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina íroknað útreiðslur til projektering og ráðgeving er 85,6 mió. kr. v/mvg, umframt landsins útreiðslur til tinglýsingargjald og tinglýsingaravgjald. Av hesum stuðlar landskassin verkætlanini við 37 mió. kr. umframt at landið skal rinda eitt tinglýsingaravgjald á á leið 300 tús. kr. Harumframt verður galdandi heimildarlóg broytt soleiðis at landsstýrismaðurin fær heimild til at játta í mesta lagi 5 mió. kr., tó ikki meira enn 50% av veruligu útreiðslunum, sum stuðul úr landskassanum til at keypa innbúgv og útbúnað, sum Húsarhaldsskúli Føroya hevur tørv á.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi heimildarlóg er løgtingslóg nr. 68 frá 9. mai 2019 um studningslán til at byggja húsarhaldsskúla í Klaksvík. Sambært løgtingslógini kann landsstýrismaðurin í mesta lagi veita 21 mió. kr. sum stuðul til at byggja húsarhaldsskúla í Klaksvík.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at hækka upphæddina, sum landsstýrismaðurin kann veita í stuðli til at byggja húsarhaldsskúla í Klaksvík. Upphæddin verður hækkað við 16 mió. kr. soleiðis at stuðulin úr landskassanum til byggingina í mesta lagi kann verða 37 mió. kr. Av hesum eru 11,6 mió. kr. meirvirðisgjald, ið landskassin fær aftur umframt tinglýsingaravgjald á á leið 300 tús. kr. Stuðulin til byggingin verður veittur sum rentu- og avdráttarfrítt lán.

Innbúgv og útbúnaður verður nú tikið við sum stuðul, soleiðis at landskassin fíggjar upp til 5 mió. kr. av tí, sum innbúgvið er mett at kosta, tó ikki meira enn 50% av veruligu útreiðslunum í samband við keyp.

[1] Sí s. 32 í skipanaruppskotinum til Húsarhaldskúla Føroya, dagfest tann 27. november 2018.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið er ein liður í at fáa bygt nýggja húsarhaldsskúlan í Klaksvík. Verkætlanin er vorðin dýrari enn mett, og tørvur er tí á at hækka stuðulin úr landskassanum tilsvarandi, umframt at stuðul eisini verður veittur til meirvirðisgjaldið. Viðmælti leisturin er gjørdur í samráð við Fíggjarmálaráðið, og hevur Fíggjarnevndin longu á fíggjarlógini 2022 játtað 4 mió. kr. í stuðli til byggiverkætlanina. Hækking av játtanini er fingin til vega til tess at kompensera fyri, at sjálvsognarstovnurin Húsarhaldsskúli Føroya ikki er frítikin fyri meirvirðisgjald.

Hartil er hædd tikin fyri, at stuðul eisini verður latin til at keypa innbúgv og útbúnað, og at tinglýsingaravgjald skal rindast fyri, at landið fær síðusettan 1. veðrætt í bygninginum.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum, Bústøðum, Landsverki, Klaksvíkar kommunu og Húsarhaldsskúla Føroya við stuttari freist at gera viðmerkingar. Orsøkin til hendan leist er, at stuðulsveitararnir longu hava ummælt verkætlanina við sjálvognarstovnin, bæði á fundum og skrivliga, í tíðarskeiðinum eftir, at tilboðið frá arbeiðstakaranum var latið skúlanum.

**Fíggjarmálaráðið** hevði viðmerkingar til almennu viðmerkingarnar í uppskotinum, og hesar vóru tiknar til eftirtektar.

**Bústaðir** hava ongar viðmerkingar til uppskotið.

**Landsverk** viðmerkir at vanligt hevur verið, at Landsverk virkar sum ráðgevi hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum í samband við onnur líknandi mál viðv. studningi/stuðli til uttanhýsis partar, og vil Landsverk eisini í hesum máli vera til taks tí viðvíkjandi sbrt. nærri uppgávulýsing. Landsverk hevur ikki havt høvi til at gjøgnumganga øll skjølini í verkætlanini, men hevur yvirskipað hesar viðmerkingar og tilmæli:

- Mæla til at meta um støddin á upphæddini til óvissur (ella ókent) er nøktandi, og um upphæddin eisini skal kunna fevna um møgulig tilkeyp. Sum skilst hevur ætlaði arbeiðstakarin latið tilboð har bæði nøgdir (ABF06 § 3, stk. 4) og indeks (prís- og lønarvøkstur sbrt. ABF06 § 22) eru læst endaliga og íroknað fyri alt byggitíðarskeiðið, og í so fall eru týðandi váðar tiknir úr. Hartil koma váðar m.a. viðv. lendinum og um projekttilfarið (tekningar, arbeiðsfrágreiðingar v.m.). eru á nøktandi dygdarstigi. At taka hædd fyri 'óvissur' um t.d. byggiplássrakstur viðv. el, hita, íbindingar, trygging v.m. vera hægri enn mett t.d. um byggitíðin verður longri enn ætlað.
- At tað fyriliggur greið avtala við høvuðsráðgevan um øll viðurskifti framyvir (projektuppfylging, fakeftirlit og byggileiðslu), og eisini um byggitíðin ikki heldur og herundir eisini indeks. Umframt at fáa vissu fyri, at nøktandi dygdargjøgnumgongd (kvalitetssikring) er gjørt av projektinum, og at allar endaligar tekningar og arbeiðslýsingar/-frágreiðingar fyriliggja (eisini tá uppskotini hjá arbeiðstakaranum til broytingar eru gjørdar), soleiðis at høvuðsarbeiðstakarin ikki í nakran týðandi mun kann gera krøv tí viðvíkjandi.
- Áðrenn UMMR gevur endaliga stuðuls-/studningstilsøgn vil LV mæla til, at øll endalig skjøl (arbeiðstakarasáttmáli og ískoyti til ráðgevarasáttmála) fyriliggja samlað, og herundir sáttmáli við Bústaðir um teirra tilskilaða part av bygninginum, og um evt.

markamót tí viðv. umframt endalig avtaluviðurskifti við Klaksvíkar kommunu um fígging og lendi og annað í hesum sambandi.
- Ávís upphædd er sett av til ráðgeva hjá skúlanum/stýrisbólkinum. Hetta metir LV er skilagott, og vil kunna tryggja eina skikkaða fakliga ráðgeving hjá skúlanum yvirfyri veitarunum.

**Uttanríkis- og mentamálaráðið** viðmerkir, at umboðið fyri bygginevndina hevur kunnað um, at tilboðið frá arbeiðstakaranum er við fastlæstum nøgdum og indeksering. Upphæddin, ið sett er av til óvissur, er somuleiðis umrødd við Húsarhaldsskúla Føroya og ráðgeva teirra, og mælti ráðgevin í hesum sambandi til – við støði í verandi vitan um ítøkiligu verkæltanini - at hendan upphædd var sett av til óvissur. Uttanríkis- og mentamálaráðið tók hetta tilmæli til eftirtektar í uppskotinum.

Í mun til avtaluviðurskiftini við høvuðsráðgevan er at siga, at Húsarhaldsskúli Føroya hevur kunnað Uttanríkis- og mentamálaráðið um vavið av galdandi sáttmála um heildarráðgeving. Uttanríkis- og mentamálaráðið fer tó, áðrenn endalig tilsøgn um studningslán verður latin, at mæla Húsarhaldsskúla Føroya til at tryggja sær, at hædd er tikin fyri teimum viðurskiftum, ið Landsverk her vísir á.

Landsverk mælir til, at Uttanríkis- og mentamálaráðið fær til vega øll endalig skjøl, undir hesum arbeiðstakarasáttmála, ískoyti til ráðgevarasáttmála, umframt sáttmálar við Bústaðir og Klaksvíkar kommunu, áðrenn endaliga tilsøgnin um studningslán verður latin Húsarhaldsskúla Føroya. Uttanríkis- og mentamálaráðið er samt við Landsverki í hesum, og viðmerkingin verður tískil tikin til eftirtektar.

**Klaksvíkar kommuna** hevur ongar viðmerkingar til uppskotið.

**Húsarhaldsskúli Føroya** hevur ongar viðmerkingar til uppskotið.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Sambært Húsarhaldsskúlanum kostar verkætlanin at byggja nýggjan húsarhaldsskúla í Klaksvík 85,6 mió. kr. v/mvg. Tá er ráðgeving, projektering, eftirlitsarbeiði og aðrir avleiddir kostnaðir íroknað. Landskassin, Klaksvíkar kommuna og Bústaðir stuðla verkætlanini soleiðis, tá ið meirvirðisgjald er íroknað:

- Landskassin 37,0 mió. kr.
- Klaksvíkar kommuna 21,0 mió. kr.
- Bústaðir 27,6 mió. kr.

Fyri landskassan koma harafturat upp til 5 mió. kr. í stuðli til innbúgv og útbúnað, tó í mesta lagi 50% av veruligu útreiðslunum, umframt tinglýsingargjald á 300 tús. kr.

Stuðulin úr landskassanum hækkar við 16 mió. kr. í mun til galdandi heimildarlóg umframt stuðulin til innbúgv og útbúnað, umframt tinglýsingargjald. Klaksvíkar kommuna fer at rinda tað sama, sum hon skuldi sambært galdandi heimildarlóg, meðan Bústaðir fara at rinda 2,6 mió. kr. v/mvg. meira.

Viðvíkjandi kostnaðinum, so er tað Húsarhaldsskúlin, sum stendur inni fyri, at hann er rættur, og at hann fer at halda. Var talan um eina verkætlan, har landið var byggiharri, vildi Landsverk sum meginregla havt til uppgávu at granska verkætlanartilfarið, bjóða út og meta um tilboðini, men av tí at talan er um ein sjálvsognarstovn, liggur tann uppgávan hjá skúlanum og teirra ráðgeva.

Síðani 2019 hevur Húsarhaldsskúlin fingið útgoldið 1,624 mió. kr. til projekteringina, meðan 13,126 mió. kr. er støðlaðar á fíggjarstøðuni á stovnsnr. 154900 *Húsarhaldsskúlin í Klaksvík, løgustuðul*. Á fíggjarlógini fyri 2022 eru játtaðar 4 mió. kr. Sostatt er peningur tøkur til at fara undir byggingina, og peningur skal tí ikki játtast fyrrenn á fíggjarlógini fyri 2023 og 2024, alt eftir, nær byggingin fer í gongd.

Tað er trupult at siga í skrivandi stund, hvussu økta játtanin á 16 mió. kr. til byggingina fellir á fíggjarlógunum fyri 2023 og 2024, tá verkætlanin eftir ætlan er væl ávegis. Mett verður at útreiðslurnar til byggingina fella soleiðis, at 8 mió. kr. skulu játtast í 2023 og 8 mió. kr. í 2024. Í 2024 skulu harumframt játtast 300 tús. kr. til tinglýsingaravgjaldið.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Sum kunnugt eru Uttanríkis- og mentamálaráðið, Bústaðir og Klaksvíkar kommuna stuðulsveitarar, meðan stýrið fyri sjálvsognarstovnurin Húsarhaldsskúli Føroya er byggiharri. Sum verandi heimildarlóg er sett saman, liggur evsta byggiharraábyrgd sostatt hjá stýrinum fyri Húsarhaldsskúla Føroya, og fara stuðulsveitararnir ikki at vera við í stýringini av sjálvi verkætlanini, ella at vera umboðaðir í bygginevndini, ið stýrið setur. Av tí at talan ikki er um eina almenna byggiverkætlan har landið er byggiharri, er Landsverk heldur ikki beinleiðis partur í verkætlanini. Leikluturin hjá Landsverki er tískil avmarkaður til, at stovnurin fer at vera limur í einum fylgibólki, ið veitir Uttanríkis- og mentamálaráðnum vegleiðing í samband við, at landið stuðlar ítøkiligu verkætlanini, og er hesin leistur avtalaður í samráð við Landsverk.

Mett verður ikki, at uppskotið ber við sær umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur annars.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur økt virksemi fyri byggivinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri umhvørvið, tí dentur er lagdur á grøna orkuloysn og burðardyggan rakstur. Hitamiðilin er sjógvhitapumpa, og hitar hon bæði gólvhitaskipanina, hitaflatur í ventilatiónini og tað heita vatnið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri nakrar millumtjóðasáttmálar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ongar kendar markaforðingar við sær.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið ber við sær, at landið átekur sær at hækka studningslánið til at byggja nýggjan húsarhaldsskúla í Klaksvík samsvarandi tí meirvirðisgjaldi, ið Húsarhaldsskúli Føroya sambært mvg-lóggávuni skal rinda av samlaðu verkætlanini, í alt 11,6 mió. kr. av samlaðu meirútreiðsluni á 16 mió. kr.

Harumframt ber lógaruppskotið við sær, at játtan verður sett av til tinglýsingargjald á 1000 kr., og tinglýsingaravgjald á leið 300 tús. kr. í samband við, at landið skal tinglýsa veð í bygninginum sbrt. § 2 í heimildarlógini.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at veita studningslán úr landskassanum til bygging av nýggjum húsarhaldsskúla í Klaksvík. Stuðulin kann í mesta lagi verða 37 mió. kr. til byggingina.
Harumframt heimilar lógaruppskoti landsstýrismanninum at veita skúlanum stuðul á 5 mió. kr. til keyp av innbúgv og útbúnað, tó í mesta lagi 50% av veruligu útreiðslunum. Í samband við, at stuðulin verður latin, kann landsstýrismaðurin sambært § 1, stk. 2 áseta aðrar treytir fyri at veita stuðulin, t.d. um útgjald av stuðli, krøv til keypta innbúgvið, mannagongdir í sambandi við, at biðið verður um tilboð o.a.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Ja | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Greinin gevur heimild til, at landsstýrismaðurin kann veita hægri stuðul til at byggja nýggjan húsarhaldsskúla í Klaksvík. Við hesi broytin hækkar stuðulin úr landskassanum úr 21 mió. kr., til 37,3 mió. kr., av einum samlaðum verkætlanarkostnaði fyri skúlapartin á 58 mió. kr., ið hesin parturin av verkætlanini er mettur at kosta, meirvirðisgjald íroknað. Íroknað hesa upphædd er tinglýsingargjald á 1000 kr., umframt tinglýsingaravgjald á leið 300 tús. kr.

Løgtingslógarbroytingin ber við sær, at parturin av stuðlinum, ið landsstýrismaðurin fær heimild at lata, kann verða meira enn 50% av samlaða verkætlanarkostnaðinum fyri skúlapartin. Eftir at hava umrøtt spurningin um fígging við Húsarhaldsskúla Føroya, metir Uttanríkis- og mentamálaráðið, at møgulig lántøka má haldast at fara at tyngja raksturin av skúlanum munandi. Í hesum sambandi skal eisini vísast á, at sbrt. § 11, stk. 1, nr. 5 í løgtingslóg nr. 66 frá 13. mai 1992 um húsarhaldsskúlar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 129 frá 11. september 2017, rindar landið 70% av øllum øðrum góðkendum rakstrarútreiðslum hjá Húsarhaldsskúla Føroya, ið ikki eru nevndar í § 11, stk. 1, nr. 1-4, undir hesum rentur. Mælt verður tískil til, at tað í hesum føri verður gjørt frávik frá galdandi § 11, stk. 1, nr. 1 í løgtingslóg nr. 66 frá 13. mai 1992 um húsarhaldsskúlar, ið ásetir, at stuðulin, ið verður latin úr landskassanum, er 50%.

*Stk. 2*.
Stuðulin verður veittur sum rentu- og avdráttarfrítt lán.

**Til § 1 a.**
Ásett verður nýggj grein í løgtingslógini, ið gevur landsstýrismanninum heimild til at veita stuðul til at keypa innbúgv og útbúnað til nýggja húsarhaldsskúlan í Klaksvík, í mesta lagi 5 mió., kr. Stuðulin er treytaður av, at sjálvsognarstovnurin Húsarhaldsskúli Føroya sjálvur fær til vegar fígging á 50% av útreiðslunum til innbúgv og útbúnað, og kann stuðulin hjá landinum ikki fara upp um 5 mió., kr., heldur ikki upp um 50% av veruligu útreiðslunum til innbúgv og útbúnað.

*Stk. 2*.
Umframt treytina í stk. 1 kann landsstýrismaðurin áseta aðrar treytir fyri at veita stuðulin. Her verður hugsað um á hvønn hátt útgjald av stuðli skal fara fram, krøv til keypta innbúgvið, mannagongdir í sambandi við, at biðið verður um tilboð, o.tíl.

Sum dømi um treytir sbrt. § 1 a, stk. 2 kann nevnast, at landsstýrismaðurin í tilsøgn sínari skal kunna áseta krav um, at tað keypta innbúgvið skal lúka vanlig ella serstøk dygdarkrøv. Sum annað dømi kann nevnast, at landsstýrismaðurin skal kunna krevja, at biðið verður um tilboð frá í minsta lagi tveimum ymiskum veitarum av innbúgvi og útbúnaði.

*Stk. 3*.
Gjørt verður greitt, at stuðul til at keypa innbúgv og útbúnað sbrt. § 1 a, stk. 1 ikki verður latin sum eitt rentu- og avdráttarfrítt lán, sbrt. § 1, stk. 2, men sum beinleiðis stuðul til

sjálvsognarstovnin Húsarhaldsskúla Føroya. Stuðulsupphæddin verður tískil heldur ikki roknað við í tí veði, sum landið sambært § 2 í galdandi løgtingslóg skal tinglýsa. Viðmerkt verður, at hesin leistur er í samsvari við § 11, stk. 1, nr. 2 í løgtingslóg nr. 66 frá 13. mai 1992 um húsarhaldsskúlar, um stuðul til at keypa innbúgv og útbúnað.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, 2. august 2022.

**Jenis av Rana**
landsstýrismaður

/ f. Poul Geert Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar Landsverk